# Harrin hevur verið góður

Øssur Berghamar | Øssur Berghamar




2. Vitnisburðir hava ljóðað - mong ein sál varð endurfødd
og vit gleddust saman, signing stór tað var.
Saman sungu vit um Jesus - lyftu upp vit vára rødd.
Mangan kendu vit, at himmalin var nær.

3. Tey, sum undan hava gingið, og í áliti á Gud
tóku trúarstig - vit minnast tey í dag.
Tí við eldhuga og ídni tey í verki tóku lut,
ja, við tøkk vit minnast teirra hjartalag.

4. Harrin Jesus er hin sami - latið okkum tí hvør sær
halda á í trúgv og treysti hond í hond.
Kristi afturkoma nærkast, skjótt vit eru komin har,
stríðið endað er - á føgru heimlandsstrond.

Copyright © ØB